Hoyringarsvar

Hetta er hoyringarsvar frá VITorka til: "*Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin) (Framleiðsla og søla av el og fjarhita)*"

Yvirskipað er talan um eitt skilagott lógaruppskot, sum, um tað fæst at virka eftir ætlan, kann førka føroyska orkumarknaðin eitt langt stig rætta vegin.

Tað, at skipa ein orkumarknað, har kapping kann vera um bæði orkuframleiðsluna og um orkuloysnirnar í nýtslupartinum, tykist vera rættiliga neyðugt og skilagott.

Somuleiðis er tað, at útskilja netið í egið sjálvstøðugt alment felag, rættiliga skilagott.

Hóast uppskotið í síni heild harvið er rættiliga skilagott, eru tó nøkur viðurskifti sum kundu verið betri og tí eru verd at vísa á.

Uppskot til tillagingar:

§15.g stk. 1: Hóast ásetingin í §1 stk. 5 ásetur at SEV skal hava sjálvstøðu feløg uttan persónssamanfall, tá talan er um kappingarútsett virksemi, tvs. t.d. sølufelag, kann reglan "*Sølan fer fram í heilsølu ella í smásølu.*" skiljast sum um at netfelagið SEV framhaldandi kann hava smásølu. Hetta er óheppi og átti at verið broytt til "*Sølan fer fram í heilsølu.*"

§15.g. stk. 2: Ásetingin: "*SEV skal dagliga áseta bindandi tímaprís fyri næsta døgnið grundað á samansetingina av orkukeldum.*" kann elva til at SEV kemur til at undirmeta ella yvirmeta framleiðsluna teir einstøku tímarnar, t.d. orsakað av broyttum veður-viðurskiftum. Hetta vil mest sannlíkt elva til, at SEV vil halda seg aftur við at bjóða alla orkuna út, men vil heldur avmarka útboðið fyri at tryggja sær móti at koma í ta støðu at skula framleiða el úr lívrunnum tilfari. Fyri at tryggja betur samsvar millum nýtsluna og veruligu framleiðsluna kundi ein intra-dag marknaður verið settur á stovn, eins og í øðrum londum, har møgulig undirskots- ella yvirskotsframleiðsla kundi verið keypt/seld, antin fyri ásettan listaprís ella fyri marknaðarprís eftir útboði og eftirspurningi. Hetta hevði í størri mun tryggjað, at øll varandi orkan varð gagnnýtt tá framleiðslan úr varandi orkukeldum gjørdist størri enn væntað og eisini at minst møguligt skuldi framleiðast úr lívrunnum tilfari tá framleiðslan úr varandi orkukeldum gjørdist minni enn væntað.

§15.g. stk. 3: Eins og við stk. 1. kann reglan "*SEV kann gera avtalur um prís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning ella sum kunnu veita SEV skipanarberandi tænastur.*" ikki skiljast øðrvísi enn at netfelagið skal kunna fremja kappingaravlagandi søluvirksemi og átti at verið broytt til: "*SEV kann, eftir útboð, gera avtalur um skipanarberandi tænastur.*"

§15.g. stk. 4: "*SEV kann áseta ymisk netgjald í mun til skiftandi last á elnetinum.*" er ein góð regla, um ætlanin er at net-kostnaðurin gerst lægri, tá nógv orka er á netinum, tí hetta vil elva til at meiri av varandi orkuni verður gagnnýtt. Hetta stendur tó ikki í lógini, men verður ásett í kunngerð sambært st. 5. og verður nevnt her fyri at tryggja at kunngerðin minnist til at meginreglan má vera at størri last skal elva til lægri prís og ikki øvut.

Bygningskunngerðin: Harumframt er neyðugt, um øll varandi orkan skal koma til høldar, at broyta ásetingina í bygningskunngerðini, BK17, ið ásetur at bygningar, ið vera hitaðir við el-orku, vera straffaðir í mun til aðrar orkukeldur, t.d. lívrunnið tilfar. Henda reglan forðar fyri at varandi orkan kann verða fult út gagnnýtt.

24. januar 2024

VITorka

Magni Laksáfoss, magni@laksafoss.com